# Adventistaskúlin

## sóknast eftir nýggjum lærara til 1. august 2009

Okkara skúli er ein frískúli, sum hevur virkað í 43 ár. Hann hevur 107 næmingar frá 1. til og við 7. flokk.

Vit eru 10 lærarar í føstum starvi og ein skúlaleiðari. Vit eru ein kristin skúli, ið leggur dent á samanhald og felagsskap, har tað einstaka barnið fær stuðul til at mennast.

Vit royna at skapa eitt heildasamstarv millum heim og skúla, soleiðis at foreldrini uppfata skúlan sum ein longdan arm hjá heiminum og øvugt.

**Tað gera vit m.a. soleiðis:**

- Morgunsangur við søgu hvønn dag.
- Tætt samstarv millum starvsfólkini.
- Stutt frá hugskoti til verk.
- Vit síggja skúla okkara sum ein felagsskap, ið byggir á tryggleika, opinleika og álit millum øll, ið starvast her.

**Vit vænta at tú:**

- Hevur eina kristna lívsáskoðan.
- Ert góð/ur við børn.
- Kanst laga teg til ein fjølbroyttan gerandisdag.
- Hevur hugflog og áræði.
- Ert opin fyri nýggjum avbjóðingum
- Hevur hug at taka lut í menningini av skúlanum.

**Vit kunnu bjóða tær:**

- Gott arbeiðslag millum góðar starvsfelagar.
- Góð foreldur at samstarva við.

**Umsóknarfreistin er sett til 1. mai.**
Umsónin verður svarað skjótt

**Skrivlig umsókn verður at senda til:**

**Adventistaskúlin**
Skúlaleiðaran Janne Schantz Johnsson
Adventistaskúlin
Hoyvíksvegur 56
100 Tórshavn

Hoyvíksvegur 56 · FO-100 Tórshavn · Tel. 31 32 60 · sdaskuli@post.olivant.fo

www.skulin.fo/adv


# Vártilboð 2009

Galdandi allan apríl-mánað

Keyp ein **Strømberg Sorano SKC5850** kromaðan handklæðsturkara og fá eitt VK300 ventilsett **ÓKEYPIS**



**Vert at vita om Strømberg**

- Leiðandi veitari av handklæðaturkarum í Danmark
- Allir Sorano turkarar hava 5 ára trygd
- Skandinaviska sniðið er reint og eyðkent

+ 

**Maria Poulsen**

**Tel 312000 · Smyrilsvegur 6-8 í Havn**


# BUSINESS CONTROLLARI TIL MAGN

**Sum ein liður í framhaldandi menning av Magn søkja vit eftir einum Business Controllara**

## Um Magn

Magn tryggjar orku til Føroyar og føroyingar. Vit eru 130 starvsfólk, svarandi til 80 árverk. Høvuðsskrivstova okkara er í Havn og deildarskrivstovur eru í Klaksvík og á Tvøroyri. 10 service støðir bera Magn navnið, av hesum eigur Magn 4. Vit hava goymslur í Klaksvík og í Havn, og mált uppá sølu eru vit ein av Føroya størstu fyritøkum.

## Um starvið:

Tú verður lyklapersónur í fyritøkuni. Tú arbeiðir bæði á strategiskum og taktiskum støði, og uppgávurnar spenna víða. Tú skalt, í samstarvi við deildarleiðarar og leiðsluna, betra leiðslukunningarskipanina á Magn, so at leiðsla og leiðarar felagsins fáa bestu og rættastu vitan at taka avgerðir útfrá. Business Controllarin fær hartil ábyrgd av fleiri størri og smærri prosjektum av bæði taktiskum og strategiskum slagi, sum hon/hann hevur ábyrgd av at fyrireika og seta í verk. Fyrsta stóra uppgávan verður at fyrireika og seta í verk nýggja fíggjarstýringsskipan á Magn.

Business controllarin vísir til fíggjarstjóran á Magn, men fer vegna tvørgangandi uppgávurnar at hava eina breiða kontaktflatu í øllum felagnum.

## Uppgávur í stuttum:

- Ábyrgd av fyrireiking, implementering og framhaldandi dygdarmenning av nýggjari leiðslukunningarskipan.
- Fyrireika, implementera og framhaldandi menna nýggja fíggjarskipan
- Gera lønsemiskanningar, bæði eftir egnum hugskoti og eftir umbøn frá, og í samstarvi við, leiðslu felagsins
- Betra mannagongdir á ymsum umráðum við tí fyri eyga at betra rakstur felagsins
- Hjálpa til við mánaðarroknskapum og øðrum vanligum roknskapar- og fíggjararbeiði

## Vit bjóða:

Vit bjóða eitt gott, avbjóðandi og ábyrgdarfult starv í eini fyritøku í menning. Her er vítt millum veggja, og um tú vilt og dugir, so sleppur tú eisini! Tað er avgerandi, at tú ert før/ur at arbeiða sjálvstøðugt og at tú loysir tínar uppgávur væl. Av hesi orsøk fært tú góðan stuðul og víðar heimildir frá leiðslu felagsins. Sjálvstøðugt arbeiði merkir eisini, at tað er møguleiki fyri fleksiblum arbeiðstíðum.

## Vit vænta:

- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni
- Royndir, gjarna frá útlandinum, við fíggjarstýring, strategi- og lønsemisgreining og prosjektleiðslu
- Royndir við nýmótans fíggjarskipanum
- Stórt áræði og eitt positivt sinnalag

## Okkara virði eru:

- Kundin í fokus
- Vitan og førleiki leingi livið
- Skjótt er gott
- Gleði gevur megi

Um tú umhugsar at søkja starvið, vinarliga fær inn á www.magn.fo og hygg nærri eftir, hvussu vit á Magn arbeiða við virðum felagsins í okkara dagliga arbeiði.

Um tú hevur spurningar, vinarliga vend tær til Johnni Poulsen, fíggjarstjóra, á telefon 347420, 237420 ella á johnni@magn.fo

Umsóknir við prógvum skulu latast inn innan 20. apríl kl. 16.00. Antin við at senda bræv til:

***Magn***
***Vestara Bryggja 8***
***FO 110 Tórshavn***
***Att: Johnni Poulsen***

Ella við at senda teldupost til johnni@magn.fo

**magn TÍN ORKA**